# TÓNLEIKARAR SUMMARFESTI



## WESTLIFE

Høvuðsnavnið man uttan iva vera írski poppbólkurin Westlife. Seinastu 10 árini er Westlife tann tónleikabólkurin í heiminum, sum hevur selt flestar fløgur. 14 ferðir hava teir toppað bretska hitlistan. Teir byrjaðu sum fimm, men Brian McFadden, sum var á Summarfestivalinum 2005, fór burturúr bólkinum. Hinir fýra hildu tó fram, og nú verða øll teirra óteljandi hitt at hoyra á Vágsbøi.




## SHU-BI-DUA

Teir skuldu havt framført á Summarfestivalinum í 2006, men tjúkki mjørkin gjørdi, at teir ongantíð lendu. Nú gera teir enn eina roynd at koma til Føroya, og teirra donsku og fólkakæru slagarar fara uttan iva at fáa fjøldina í gott lag.



## PÁLL FINNUR PÁLL

Bólkurin, sum fær øll at syngja hart við, so skjótt teir taka fyrstu tónarnar av kendu løgunum. Hittini eru hópatals, og hóast fjepparanir kanska serliga finnast í yngra partinum av áhoyrarunum, so munnu tey flestu kunna murra við til løg sum "Forelskaður Sjónleikari" og "Eg".

## GRANDMA'S BASEMENT

Ein bólkur av ungum klaksvíkingum, sum júst hava givið sína fyrstu fløgu út. Tónleikurin er lættur, og minnir í stíli kanska eitt sindur um Dynamitt. Tekstirnir eru skemtiligir og tónleikurin lættur.



## TINGANEST

Ein bólkur, sum eftirhondini er gamal í garði, men sum tó enn eisini megnar at fáa ungu áhoyrararnar at syngja við. Røddir og tónleikur eru eyðkend, og fleiri av løgunum eru vorðnir slagarar, sum fólk duga uttanat.

## DYNAMITT

Klaksvíksbólkurin, sum er vorðin ímyndin av Summarfestivalinum. Hóast sangirnir kanska ikki eru listarlig eindømi, so hevur bólkurin fingið fastatøkur á Føroya fólki, og eingin kann lata vera við at syngja við til løg sum "Grøv nr 13" og "Til allar kvinnur".



## THE DREAMS SAMAN VIÐ NIARN

Teir hava leingi verið heimskendir í Føroyum, og arbeiða nú hart uppá at sláa navnið fast uttanlands eisini. Niðri hava teir havt fleiri løg á hittlistunum, og nú eru teir slopnir á ein av rocklistunum hjá MTV.

Niarn er ein av størstu donsku rapparunum, sum m.a. fekk nógva umtalu, tá hann fór í eitt drúgt orðaskifti í miðlunum um, hvørt tað er í lagið at kalla damuna fyri bitch í rapp-tekstum. Spennandi samstarv!





## MARTIN JOENSEN

Vit kunnu takka honum fyri eitt hav av góðum sangum, sum vit øll duga uttanat. Løg sum "Morgun", "Trýssini" og "Lat meg goyma teg" fáa altíð fólk at syngja hart við.

## LÍV NÆS

Serstaka og reina røddin, sum gjørdist kend, tá hon sang vísur saman við Niels Midjord. Nú fer hon at syngja einsamøll á Samanhald pallinum.



## HANUS G. JOHANSEN

Honum nýtist sum so onga nærri frágreiðing. Hann hevur verið virkin innan tónleik í mong ár, men gjørdist av álvara fólkaogn, tá hann setti framúrskarandi løg til yrkingar hjá Poul F.